Heilsu- og orkumálaráðið

Dagfesting:	20.08.2026
Mál nr.:	25/12244
Málsviðgjørt:	BL
Ummælistíð:	27.11.25 til 08.01.26
Eftirkannað:	29.05.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í anordning for Færøerne om euforiserende stoffer
(Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkinum rúsandi evni)

§ 1

Í anordning for Færøerne om euforiserende stoffer, sambært anordningsbekendtgørelse nr. 1349 af 23. november 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 1, 1. pkt. og § 2, stk. 1 verður "Sundheds- og ældreministeren" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

2. Í § 1, stk. 1, 1. pkt. og § 2, stk. 1 verður "Sundhedsstyrelsens" broytt til: "Heilsustýrisins".

3. Í § 1, stk. 1, 1. pkt. verður "ham" broytt til: "ham eller hendes".

4. Í § 1, stk. 1, 1. pkt. verður "ministeren" broytt til: "landsstýrisfólkið".

5. Í § 2, stk. 2, 1. pkt. verður "sundheds- og ældreministeren" broytt til: "landsstýrisfólki".

6. Í § 2, stk. 2, 2. pkt. verður "Ministeren" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

7. Í § 2, stk. 2, 2. pkt. verður "han" broytt til: "han eller hun".

8. Í § 1, stk. 2 verður "Sundheds- og ældreministeren kan efter forhandling med landsstyret" broytt til: "Landsstýrisfólkið kann".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Við uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum rúsandi evni), sum verður lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskotið, verður hetta málsøkið formliga yvirtikið. Hetta soleiðis, at føroyskir myndugleikar, sbrt. lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, fáa lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum.

Tá ið málsøkið er yvirtikið, verða allar ásetingar, ið nú eru galdandi í Føroyum, og sum ikki stríða móti heimastýrislógini, verandi í gildi, inntil tær verða broyttar ella avtiknar av rætta myndugleika, sbrt. § 5 í yvirtøkulógini, smb. § 13 í heimastýrislógini, við broyting sbr. § 2 í ræðislógini.

Har heimildir ella skyldur á hesum málsøkinum liggja hjá donskum myndugleikum, verða tær við hesum uppskotinum fluttar til avvarðandi føroyskar myndugleikar.

1.2. Galdandi lóggáva
”Lov om euforiserende stoffer” er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan nr. 347 frá 21. desember 1956, nr. 442 frá 22. august 1969, nr. 150 frá 21. marts 1988 og nr. 1321 frá 2. desember 2014 við teimum broytingum, sum føroysk viðurskifti krevja. Tær kongligu fyriskipanirnar eru savnaðar í fyriskipanarkunngerð nr. 1349 frá 23. november 2015. Harafturat kemur kunngerð nr. 1217 frá 8. juni 2021 fyri Føroyar um euforiserandi evni.

Lóggávan fevnir um “lov om euforiserende stoffer, jf. lovbekendtgørelse nr. 1334 af 9. december 2019”, og “bekendtgørelse om euforiserende stoffer, jf. bekendtgørelse nr. 2446 af 12. december 2021, sum senest er ændret med bekendtgørelse nr. 454 af 7. maj 2024 og bekendtgørelse nr. 972 af 28. juni 2016 om stofindtagelsesrum”.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við hesum lógaruppskoti er at nágreina, hvør føroyskur myndugleiki hevur tær ymsu skyldurnar og heimildirnar eftir yvirtøkuna.

Í aðrar mátar stendur verandi lóggáva á økinum við, sbr. § 5 í yvirtøkulógini (lóg nr. 79 frá 12. mai 2005) og sbr. § 13 í heimastýrislógini (Lov nr. 11. frá 31. mars 1948).

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við hesum lógaruppskoti verður nágreinað, hvør føroyskur myndugleiki hevur tær ymsu skyldurnar og heimildirnar eftir yvirtøkuna.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá: Sjúkrahúsverkinum, Heilsustýrinum, Landsapotekaranum, Landslæknanum, Sjúklingaráðnum, MEGD, TAKS, Føroya Kærustovni, Løgmálaráðnum, Løgregluni, Sorinskrivaranum og Ríkisumboðnum.

Hesir stovnar hava sent inn hoyringarsvar til lógaruppskot um yvirtøku av málsøkjunum tvingsil í psykiatri og rúsandi evni: Landssjúkrahúsið, Heilsustýrið, Føroya Kærustovnur og MEGD.

Flestu hoyringarsvarini vísa á ymisk viðurskifti í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum um tvingsil í psykiatri.

Eftir at hava viðgjørt hoyringarsvarini, er avgerð tikin um, at yvirtøkan av málsøkinum tvingsil í psykiatri ikki verður partur av hesum uppskoti. Hetta uppskotið fevnir um at yvirtaka málsøkið rúsandi evni.

Einans hoyringarsvar, sum hava við yvirtøkuna av málsøkinum rúsandi evni at gera, verða viðgjørd niðanfyri. Hoyringarsvar, sum hava við yvirtøkuna av málsøkinum tvingsil í psykiatri at gera, eru ikki við hesum lógaruppskoti og verða ikki viðgjørd.

Heilsustýrið vísir á, at skal Heilsustýrið hava hesar uppgávur, sum eru nevndar í lógaruppskotinum, skal eisini fígging til stovnin fylgja við. Hettar fyri at røkja hesar uppgávur á bestan hátt. Her serliga við denti á váðameting av nýggjum rúsandi evnum, men eisini hini økini.

Heilsu- og orkumálaráðið vísir á, at í sambandi við, at hetta uppskotið varð tilevnað, hevur Sundhedsstyrelsen upplýst soljóðandi:"Sundhedsstyrelsen røkir uppgávuna, sum snýr seg um váðameting av nýggjum evnum, harundir í samstarvi við aðrar myndugleikar, at hava eftirlit við rúsevnamarknaðinum, og eftir umstøðunum mæla Indenrigs- og Sundhedsministeriet til, at evnini verða tikin við í skipanina. Sundhedsstyrelsen brúkar umleið 940.000 kr. árliga, sum eisini fevnir um útgjaldið hjá stovninum til rættarkemi- og rættarlæknastovnarnar fyri at gera greiningar v.m. Umframt hesa upphædd metir stovnurin, at umleið 0,25 ársverk verður brúkt til at avgreiða uppgávurnar. Sundhedsstyrelsen hevur ikki møguleika at meta um starvsfólkaorkuna, sum serliga viðvíkur Føroyum."

Heilsu- og orkumálaráðið vísir á, at eftir at hava yvirtikið ábyrgdina av málsøkinum "euforiserende stoffer", mugu Føroyar tryggja, at lóggávan og umsitingin av hesum er í samsvari við rúsevnasáttmálarnar hjá ST, sum Danmark hevur tikið undir við. Føroyskir myndugleikar fara at kunna tryggja sítt samsvar við sáttmálarnar, við í roynd og veru at tryggja, at tey evni, sum ST-nevndin fyri rúsevni hevur tikið við í sáttmálarnar, verða tikin við í kunngerðina um euforiserandi evni.

Heilsu- og orkumálaráðið metir, at uppgávan at tryggja at tey evni, sum ST-nevndin fyri rúsevni hevur tikið við í sáttmálarnar, verða tikin við í kunngerðina um euforiserandi evni, kann røkjast við, at Indenrigs- og Sundhedsministeriet kunnar Heilsu- og orkumálaráðið um allar broytingar í lóggávuni um euforiserandi evni, sum danskir myndugleikar seta í gildi. Síðani kann Heilsu- og orkumálaráðið broyta føroysku kunngerðina, soleiðis at neyðugu evnini verða sett á listan yvir evni, ið einans kunnu nýtast til medisinsk og vísindalig endamál.

Heilsu- og orkumálaráðið vísir harafturat á, at játtanin til Heilsustýrið er hækkað við 4 mió. kr. í sambandi við, at farsóttarmálsøkið varð yvirtikið 1. januar 2024, umframt at málsøkini fyribyrging og fólkaheilsa, harundir sálarheilsa, vórðu upprøðfest. Í 2026 varð játtanin til Heilsustýrið hækkað við 1,1 mió.kr. til læknafakligan førleika á stovninum.

Vísandi til omanfyristandandi metir Heilsu- og orkumálaráðið ikki, at tað fara at standast útreiðslur av hesum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað standast ikki fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum, av tí at broytingarnar eru ein avleiðing av lógaruppskotinum: yvirtøka av málsøkinum rúsandi evnum.

Fíggjarligu avleiðingarnar av sjálvari yvirtøkuni av hesum málsøkinum eru lýstar í kap. 2.1. í løgtingsmáli um: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum rúsandi evnum).

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Í lógaruppskotinum verður nágreinað, hvør føroyskur myndugleiki hevur skyldur og heimildir á málsøkinum rúsandi evnum. Hetta merkir, at føroyskir myndugleikar frameftir taka sær av uppgávum, ið danskir myndugleikar áður hava umsitið. Mett verður tí, at hetta lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar við sær fyri landið ella landsmyndugleikar.

Umsitingarligu avleiðingarnar av sjálvari yvirtøkuni av hesum málsøkinum eru lýstar í kap. 2.2. í løgtingsmáli um: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum rúsandi evnum).

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, “Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention”. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Sáttmálin er kunngjørdur við Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.

Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrisfólkið heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Til § 1, nr. 1 – 2, nr. 4 og nr. 8.
Við hesum greinum verða myndugleikaflytingar gjørdar til tilsvarandi føroysku myndugleikar.

Til § 1, nr. 3
Í hesari áseting verður "ham" broytt til "ham eller hendes", av tí, at landsstýrisfólkið kann verða maður ella kvinna.

Til § 1, nr. 7
Í hesari áseting verður "han" broytt til "han eller hun", av tí, at landsstýrisfólkið kann verða maður ella kvinna.

Til § 2
Gildiskomuáseting. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi tann 1. januar 2027. Hetta soleiðis, at føroyskir myndugleikar hava stundir til at fyrireika yvirtøkuna og at gera neyðugar samstarvsavtalur við danskar myndugleikar.

Heilsu- og orkumálaráðið, tann 20. august 2026

Eyðdis Hartmann Niclasen
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar - Heilsustýrið